## Dýrari at liva

Brúkaraprísirnir í Grønlandi hækkaðu 5,4 prosent í 2007 samanborið við árið fyri. Grønlendska hagstovan sigur, at verða avgjaldshækkingarnar seinasta heyst roknaðar frá, var prísvøksturin 3,6 prosent, sum í høvuðsheitum stavaðu frá frukt og grønmeti. Íbúðarútreiðslurnar hækkaðu fimm prosent í fjør og áttu tískil eisini lut í samlaðu hækkingini. Hagstovan í Nuuk samanber við Danmark, har prísvøksturin var 3,1 prosent í fjør.



*Frukt og grønmeti gjørdu sítt til prísvøksturin í Grønlandi í fjør*
*(Mynd: KNR)*

## USA-kreppa rakar Svøríki

Hetta er ringasta búskaparkreppan síðani 1929 og tað er bláoygt at trúgva, at tað, sum hendir í USA ikki heldur fram í Svøríki. Og tey, sum siga, at India og Kina fara at bjarga Svøríki úr kreppuni, fyrigykla fólki. Tað sigur sjefanalytikarin hjá Handelsbanken Capital Markets, Mats Kinnwall. Tí hóast tað gongur væl í løtuni, er tað bert ein spurningur um tíð, áðrenn tað gongur galið aftur. – Eftir hvørt bjargingartiltak koma nýgir trupulleikar. Í besta føri eru vit í endanum av byrjanini á búskaparligu trupulleikunum í USA, sigur Mats Kinnwall við Børsen

# Pedagogarnir eru komnir

**Lýsingin av søguni hjá pedagogunum í nýggju bókini Hygg! Pedagogarnir eru komnir, er samstundis ein forvitnislig lýsing av føroyska hugburðinum til barnaansing seinastu 25 árini**

NÝGGJ BÓK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

”... í sjeytiárunum vóru pedagogar illa lýddir. Teir vóru sagdir at máa støðið undan teirri klassisku móðurrollini. Flestu konur so væl sum menn omanfyri tey fjøruti beinleiðis hataðu pedagogar.”

So bersøgin er rithøvundurin, Jóanes Nielsen, í innleiðandi greinini í nýggju bókini hjá Føroya Pedagogfelag ”Hygg! Pedagogarnir eru komnir”, sum eisini er heitið á bókini.




*Leygardagin gav Føroya Pedagogfelag út bókina ”Hygg! Pedagogarnir eru komnir” í sambandi við, at felagið fylti 25 ár fyri stuttum*

### Íkast til kjak

Nógv vatn er runnið í ánna, síðani pedagogar mestsum vóru fataðir sum ein hóttan móti kristiligu virðunum til í dag, nú støðugt fleiri foreldur seta sum krav, at teirra børn verða ansað av netupp pedagogum.

Endamálið við nýggju bókini er millum annað at geva eina mynd av, teimum rembingum, sum hava verið í søguni og yrkinum hjá føroyskum pedagogum, undan og eftir at Føroya Pedagogfelagi varð stovnað.

Eisini varpar bókin ljós á støðuna í yrkinum í dag og lýsir, hvat eigur at verða lagdur dentur á í framtíðini fyri at menna og styrkja námsfrøðiliga økið í Føroyum.

Í formælinum vísir nýliga afturvaldi formaðurin í Føroya Pedagogfelag, Jarvin F. Hansen, á, at lítið er skrivað um søguna hjá pedagogunum, og at lítið og onki er granskað í teirra yrki her á landi. Tí vónar hann, at nýggja bókin verður fyrsta stigið á leiðini at røða um námsfrøði í einum fakligum og praktiskum høpi, umframt at greinarnar kunnu verða íkast til kjak.

Umframt tankavekjandi greinina hjá Jóanesi Nielsen, eru greinar eftir námsfrøðingar, fólkalívsfrøðing og hugmyndafrøðing. Eisini eru samrøður við allar forkvinnurnar og formenninar, ið hava verið í felagnum, síðani tað varð sett á stovn fyri fjóðringsøld síðani.

Hygg! Pedagogarnir eru komnir er 120 blaðsíður.

Ritstjórnað og skipað bókina hevur Turið Kjølbro.

## Brot

Brot úr bókini, har Jóanes Nielsen, rithøvundur lýsir løtuna á 1.mai kvøldsetu í 1979, tá Hjørdis Johansen trein á pallin við sanginum ”Í barnagarði”:

*Soleiðis hevði ongin sungið barnasangir fyrr. Tað var, sum ”Kongaríkið í Babylon” var sprongt í luftina, og ”Dukka mín er blá” fargaðist grøn av øllum gallinum, sum streymaði út í salin. Pedagogbarbararnir vóru komnir, og millum 1. mailuttakararnar sá mann fyri sær ein djúpt vónleysan Hans Andrias Djurhuus royna at bjarga rovunum av síni hugnaligu diggu-digg verð.*




*Nýggja bókin Fiskaskipanin er prýdd við góðum myndum og tekningum, sum gera tað lætt hjá lesararnum at kenna aftur eyðkennini á teimum ymsu fiskasløgunum*

# Nýgg fiskabók

**Stutt fyri páskir kom út ein nýggj fiskabók, ið lýsir skilnaðin millum tey ymsu fiskasløgini, og hvussu hesi verða skipað**

NÝGGJ BÓK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Fiskaskipanin - lýst við dømum við fiskinum á Føroyabanka er heitið á nýggjari fiskabók, sum Eyðfinnur Magnussen, biologur á Náttúruvísundadeildini á Fróðskaparsetrinum hevur skrivað. Bókin lýsir lýsir skilnaðin ímillum tey ymisku fiskasløgini, og hvussu hesi verða skipað við støði í felags eyðkennum.

### Breið lýsing

Bókin byrjar við at geva eina almenna lýsing av fiski, og hvussu nógv fiskasløg vit kenna í dag. Eisini verður greitt frá útsjóndini og nøkrum grundleggjandi hugtøkum um fisk. Greitt verður í stuttum frá vistskipanini á Føroyabanka og fiskinum, sum heldur til á Bankanum.

Síðani verður greitt frá djóraskipanini, og hvussu fiskur og aðrar livandi verur verða bólkaðar við støði í felags eyðkennum. At enda verður tikið samanum eyðkennini hjá fiskunum, sum eru umrøddir í bókini.

Aftast í bókini er ein listi við øðrum lesnaði um Føroyabanka og fiskin, sum har livir, og um fiskaskipanina í síni heild.

Fiskiskipanin er prýdd við góðum myndum og tekningum, sum gera tað lætt hjá lesaranum at kenna aftur eyðkennini fyri ymsu fiskasløgini.

Bókin er ætlað undirvísingini í miðnámsskúlunum og á Fróðskaparsetrinum og annars øllum, sum hava áhuga fyri fiski. Útgangsstøðið í bókini er heftið ”Fiskasystematikkur”, sum kom út á heysti 2003 og varð nýtt til undirvísingina í fiskalívfrøði, ið er ein av lærugreinunum í lívfrøðiútbúgvingini á Fróðskaparsetrinum.

Tað er Føroya Skúlabókagrunnur sum gevur bókina út. Bókin er 41 síður til støddar og fæst í bókhandlunum kring landið.